# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# MUGU MÝKJA TIL SEMJU

Tað stendur á gomlum nøglum í samráðingunum millum tey fimm fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Soleiðis er støðan í øllum førum beint nú, vit ikki vita, um semingsroyndin røkkur ella støkkur.

Tað lønarsamráðingar eru, so er altíð spurningurin, hvussu stór lønarhækkingin skal vera. Men soleiðis tykist ikki bara at vera hesaferð. Sum skilst hevur Fíggjarmálaráðið lagt út við eini lønarlækking upp á trý prosent. Hetta man annaðhvørt vera eina provokatión ella í besta føri ein yvirdrivin roynd at náa einari null-loysn.

Fakfeløgini hinvegin hava kravt eina lønarhækking upp á seks prosent. Tað er helst á sama hátt ein roynd at lyfta støðið frá teimum áleið trimum prosentunum, sum onnur hava fingið.

Tað kann virka naivt av landsstýrinum at rokna við, at fakfeløg fara at góðkenna ein sáttmála, sum onga lønarhækking hevur yvirhøvur. Hinvegin so stendur Jóannes Eidesgaard yvir einum skralltómum landskassa við einum árligum halli upp á eina slaka milliard. Og hann og hini í samgonguni ætla at hava javnvág í á fíggjarlógini í 2015. So seint sum í síðstu viku sóu vit, at samgongan vil hetta so nógv, at samgonguskjalið varð sett til víks, soleiðis at blokkstuðulin úr Danmark kundi hækka 400.000 krónur.



Men er tað rímuligt av landsstýrinum at krevja, at lønirnar ikki skulu hækka – ella enn tá kanska lækka? Á privata arbeiðsmarknaðinum bar tað ikki til, so í so máta hava fakfeløgini góð kort á hondini. Hinvegin so vita vit, at á mongum privatum arbeiðsplássum eru avtalur gjørdar um lønarlækkingar – í fleiri førum er talan um stórar lækkingar, hóast sáttmálalønin ikki verður nortin. Aðrastaðni fækk arbeiðstímarnar og harvið eisini lønin.

Í seinastu kreppuni vórðu allar almennar lønir lækkaðar yvir ein kamb. Tað var helst neyðugt tá fyri at útvega landskassanum gjaldføri. So ring er støðan ikki nú, men eyðsæð er, at landshúsarhaldið ikki hevur ráð til stórar lønarhækkingar – og tí munnu reellu lønarkrøvini ikki verða størri enn tey 2-3 prosentini.

Verður verkfall, so er skjótt at rokna út, at eftir eini tveimum vikum, so hevur landið spart ta upphæddina, sum hendan lønarhækkingin kostar – og so fer at vera klárt at skriva undir...

**Semjan verður helst ein varin lønarhækking**

# Skerpandi umstøður tá fakfelag traðkar á starvsfólk

Tað er fallið samskiparanum hjá Samtaki, Sonju Jógvansdóttir, fyri bróstið, at vit á hesum stað fríggjadagin skrivaðu greinina *»Tá fakfelagið verður størsti fíggindin hjá starvsfólki«*.

Í greinastubbanum undraðust vit á, at Samtak stuðlar slíkum fakfelagsskaðiligum virksemi, sum tað er at burturvísa eitt starvsfólk uttan grund.

Sonja Jógvansdóttir sigur, at Samtak einki hevur við málið at gera, og at tað tí er skeivt av okkum at leggja Samtak undir at stuðla slíkum virksemi, og hon heldur, at ein umbering frá okkum er hóskandi.

Tá vit hefta Samtak upp í hetta málið, so er tað tí, at Føroya Fiskimannafelag er partur av Samtaki saman við Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Tað var ikki rætt av okkum at siga, at Samtak *beinleiðis* stuðlar ella hevur stuðlað Føroya Fiskimannafelag, men tað sum vit hava saknað er, at



*Sonja Jógvansdóttir er samskipari hjá Samtaki*

feløgini hava tikið frástøðu frá fakfelagsskaðiliga virkseminum hjá Føroya Fiskimannafelag. Tað hava tey ikki gjørt!

Serliga skerpandi eru umstøðurnar, tá fakfeløg traðka á mest grundleggjandi viðurskifti hjá starvsfólkum, tí er hetta málið serliga áhugavert. Hevði tað verið eitt hvørt vanligt arbeiðspláss, sum soleiðis burturvísti fólki uttan grund, so skuldi fakfeløgini nokk gjørt vart við seg. Vit eiga eisini at minnast til, at starvsfólkið hjá Fiskimannafelagnum ikki ein gong hevur eitt fakfelag at fara til, tí tað er fakfelagið sum er fíggindin. Hvussu kann eitt starvsfólk koma verri fyri?

Vit spurdu Sonju Jógvansdóttir í morgun, um Samtak nú hevur eina viðmerking, ella um hon heldur tað vera í lagi, sum Fiskimannafelagið hevur gjørt.

- Ein burturvísing skal ikki gerast uttan grund, so hatta var skeivt og óumhugsað, sigur hon, men leggur dent á, at Samtak ikki er partur av málinum.

Hon sigur, at hon hevur fingið eina nøktandi frágreiðing frá Fiskimannafelagnum um málið og hevur tikið hana til eftirtektar og hevur annars onga meining um málið. Hon heldur fast um, at tað var skeivt at Sosialinum at linka Samtak saman við hesum máli.

*Vit halda enn sum áður at tað er átaluvert, at eitt fakfelag, sum er partur av Samtaki, sleppur at traðka á grundleggjandi fakfelagsrættindini uttan at verða átalað av øðrum fakfeløgum – annars er legitimiteturin hjá fakfeløgunum í stórum vanda.*



**Politikarar og kreppuleiðsla**

REIDAR NÓNFJALL
KJAK Á SÍÐU 28



**Sjálvberandi búskapur**

KITTY MAY ELLEFSEN
KJAK Á SÍÐU 27

# Limir í altjóða felagsskapi

Føroysk Miðlafólk eru nú limir í altjóða journalistfelagsskapinum

Altjóða journalistfelagsskapurin IFJ samtykti einmælt sunnumorgunin, at Føroysk Miðlafólk fáa limaskap. Harvið eru føroyskir journalistar nú partur av einum felagsskapi, sum umboðar fleiri enn 600.000 journalistar kring allan heimin.

Føroysk Miðlafólk, ið er fakfelagið hjá føroyskum miðlafólkum, varð á fundi í Brussel ígjár tikin upp sum limur í International Federation of Journalists (IFJ).

- Ágangurin á journalistar og journalistiska fakið økist alsamt, bæði úti í heimi, og eisini her heima í Føroyum. Tí meta vit tað vera neyðugt, at vit gerast limir í IFJ, har vit fáa neyðuga stuðulin til at stríðast fyri okkara rættindum. Og Føroysk Miðlafólk fara eisini at stuðla tí arbeiði, sum IFJ ger fyri at hjálpa journalistum, ið stríðast fyri sínum rættindum, sigur Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í Føroysk Miðlafólk.



*Anna Ellingsgaard, forkvinna í Føroyskum Miðlafólkum*

Fyri knøppum mánaði síðani sendi Føroysk Miðlafólk umsókn um limaskap í IFJ, og hetta gekk skjótari enn tey kundu væntað sær.

- Men við hollum stuðli frá okkara norðurlendsku systurfelagsskapum, serliga Norsk Journalistlag, fingu vit umsóknina við á dagskránna á fundinum hjá IFJ um vikuskifti, sigur hon.

Føroysk Miðlafólk hava í nógv ár havt tætt samstarv við norðurlendsku miðlafakfeløgini gjøgnum Nordisk Journalistforening. Hetta hevur verið eitt samstarv, har FM hevur fingið dygg-an fakligan stuðul til sítt arbeiði.

Nú eru felagið eisini farið upp í altjóða felagsskapin fyri journalistar, IFJ.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*